Sáttmáli millum

**Heilsurøktarafelagið**

**og**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**Viðvíkjandi løn og starvsviðurskiftum v.m. fyri starvsfólk, ið eru sett eftir hesum sáttmála.**

**2015**

**Innihaldsyvirlit**


| | |
|---|---|
| § 1. Sáttmálaøki | 3 |
| § 2. Samráðingarrættur | 3 |
| § 3. Setanarbræv og starvslýsingar | 4 |
| § 4. Løn | 4 |
| § 5. Viðbøtur | 5 |
| § 6. Eftirløn | 6 |
| § 7. Eftirsitiløn | 6 |
| § 8. Lønarútgjalding | 6 |
| § 9. Starvsaldur | 6 |
| § 10. Arbeiðstíð | 7 |
| § 11. Tilkallað vakt | 10 |
| § 12. Frítíðarreglur | 11 |
| § 13. Sjúkraflutningur | 12 |
| § 14. Tænastubúni | 12 |
| § 15. Frálæra | 12 |
| § 16. Eftirútbúgving | 13 |
| § 17. Farloyvi | 13 |
| § 18. Sjúka | 13 |
| § 19. Barnsburðarfarloyvi | 13 |
| § 20. Uppsøgn | 14 |
| § 21. Broyting í arbeiðsgongd v.m. | 15 |
| § 22. Tímalønt starvsfólk | 15 |
| § 23. Gildi sáttmálans | 16 |
| Álitisfólkaskipan | 17 |
| Avtala um tiltøk, ið kunna stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk | 18 |
| Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning | 19 |
| Avtala um serstaka fríviku | 21 |
| Protokollat viðvíkjandi arbeiðsumstøðunum | 21 |
| Protokollat viðvíkjandi samstarvsráði | 22 |
| Normtíð fyri mánaðin | 22 |

**§ 1. Sáttmálaøki**
Hesin sáttmáli fevnir um heilsurøktarar, pleygarar, sjúkrahjálparar, røktarheimsassistentar, ítrivsvegleiðarar og neurofysiologiassistentar sum arbeiða á stovnum, har Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur málsræði at áseta lønir og setanartreytir.
**Stk. 2.** Heilsurøktari merkir persónur, sum hevur lokið útbúgving sambært lóg um almanna- og heilsuútbúgving.
**Stk. 3.** Pleygari merkir persónur, sum hevur lokið útbúgving sambært "Sundheds-styrelsens retningslinjer" frá 12. juli 1977.
**Stk. 4.** Sjúkrahjálpari merkir persónur, sum hevur lokið útbúgving sambært cirkulære frá Sundhedsstyrelsen frá 20. januar 1978.
**Stk. 5.** Røktarheimsassistentur merkir persónur, sum hevur lokið prógv sambært cirkulære frá Sundhedsstyrelsen frá 26. juni 1980 ella áliti nr. 583/1970 frá Sundhedsstyrelsen.
**Stk. 6.** Ítrivsvegleiðari merkir persónur, sum hevur fingið útbúgving, ið er góðkend av innanríkismálaráðnum ella koma undir skiftisreglur, ið nevndar eru í cirkulære innanríkismálaráðsins frá 18. juni 1976, deild V.
**Stk. 7.** Neurofysiologiassistentur (neuroanalytikari) merkir persónur, sum hevur lokið eina 2½ ára tekniska útbúgving samsvarandi "undervisningsminiseteriets bekendtgørelse nr. 669 af 11. juli 1996"
**Stk. 8.** Tá ið søkt verður eftir stuðulsfólki, har førleikakrøvini eru heilsurøktari, pleygari ella sjúkrahjálpari, skal lønast samsvarandi hesum sáttmála.

**§ 2. Samráðingarrættur**
Samráðingarrættin hevur Heilsurøktarafelagið, ið ger sáttmála við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.
**Stk. 2.** Ivaspurningar um tulking av sáttmálanum verða at leggja fyri Fasta gerðarættin.

**§ 3. Setanarbræv og starvslýsingar**
Mánaðarlønt starvsfólk fær í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:
1. navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
2. nær setanin tekur við
3. galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir,
4. starvsheiti,
5. byrjanarløn (grundløn umframt fastar viðbøtur og/ella ískoyti),
6. eftirlønargjald,
7. starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
8. uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og setta,
9. setanarbrotpartur, arbeiðstíð, avtala um ávísa arbeiðstíð, t.d. dag-, kvøld- og náttarbeiði,
10. frítíð við løn og frítíðarískoyti,
11. setanarøki og
12. arbeiðsstaður/staðir í løtuni (fatar arbeiðið um fleiri arbeiðsstaðir, skal verða viðmerkt á hvørjum arbeiðsstaði umsøkjarin hevur høvuðsstarv).

**Stk. 2.** Leys størv, sum sett skulu verða eftir hesum sáttmála, skulu verða lýst leys alment og á stovninum. Lýsast skal soleiðis, at almenningurin á bestan hátt verður kunnaður um lýsingina.

Tilskilast skal hvat starvið fevnir um.
Er talan um nýtt starv, sum ikki higartil er flokkað, skal Fíggjarmálaráðið/KAF samráðast við Heilsurøktarafelagið um flokking, áðrenn starvið verður lýst leyst. Umsóknarfreistin skal vera í minsta lagi 14 dagar frá tí lýst er.
**Stk. 3.** Tá størv verða lýst leys at seta, verða hesi at seta við fólki, sum lýkur treytirnar í § 1. Um so er, at hetta ikki letur seg gera, og talan verður um at seta fólk, sum ikki lúka førleikakrøvini í starv, skal hetta leggjast fyri Heilsurøktarafelagið til viðgerðar.
**Stk. 4.** Tey størv, sum eru sett við fólki, sum ikki lúka førleikakrøvini sambært § 1**,** skulu lýsast leys 1/2 hvørt ár, so at fólk, sum lýkur førleikakrøvini sambært § 1 fáa møguleika at søkja hesi størv.

**§ 4. Løn**
Flokkingar:
**Stk. 1**. Pleygari gongur stigini: 18-23.
**Stk. 2.** Heilsurøktari gongur stigini: 18-23.
**Stk. 3.** Sjúkrahjálpari gongur stigini: 17-22.
**Stk. 4.** Sjúkrahjálpari/pleygari, ið fær útbúgving sum heilsurøktari fer eitt lønarstig upp.
**Stk. 5.** Røktarheimsassistentur gongur stigini: 17-22.
**Stk. 6.** Ítrivsvegleiðari gongur stigini: 17-22.
**Stk. 7.** Neurofysiologassistentur gongur stigini: 20-26.

**Leiðarar/Deildarleiðarar**
Størv sum leiðari verða at flokka í samráð við avvarandi fakfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Sum kriteria kunnu verða nýtt: Mongd av starvsfólki, um tað er dagtilhald ella døgnstovnur og um leiðarin hevur fíggjarliga ábyrgd. Leiðaraviðbót er 2.000,-.

- Leiðari 1. gongur stigini: 31 - 35
- Leiðari 2. gongur stigini: 32 - 37
- Leiðari 3. gongur stigini: 34 - 39

**Setan í hægri starv:**
Starvsfólk sett eftir hesum sáttmála, sum fyribils røkja hægri stav í minst eina viku, eiga í hesum tíðarskeiði somu løn, sum tey høvdu fingið, um tey vóru sett í hægra starvið.

**§ 5. Viðbøtur**
Førleikaviðbót kann latast fyri eftirútbúgving. Hesar viðbøtur eru førleikaviðbøtur og eru knýttar at starvinum. Fyri at kunna fáa førleikaviðbót, skal eftirútbúgvingin verða kravd og verða frá góðkendum útbúgvingarstað. Sjálvt um starvsfólk hava tikið meira enn eina eftirútbúgving, so verður bert ein viðbót latin. Er starvið parttíðarstarv verður viðbótin samsvarandi setanarbrøkinum.
Eftirútbúgving 120 tímar: 750,-kr.
Eftirútbúgving 160 tímar: 1.000,-kr.
Eftirútbúgving 200 tímar: 1.250,-kr.

**Vandaviðbøtur:**
Starvsfólk, sum arbeiða á stongdari deild, fáa eina vandaviðbót áljóðandi 700 kr. um

mánaðin. Henda viðbót kann eisini latast, tá ein deild av trygdarávum verður stongd í meir enn ein mánað út í eitt. Gjaldið verður tá kr. 29,17 fyri hvørja planlagda vakt, ið er arbeidd við góðkenning deildarleiðarans. Hetta gjaldið verður bert latið til starvsfólk, sum ikki frammanundan fáa nevndu viðbót.
**Stk. 2.** Hjá parttíðarsettum verður lønarbrotparturin niðurskrivaður í mun til arbeiðstíðina.
**Stk. 3.** Serligar reglur eru fyri tímalønt starvsfólk, smb. § 22 um tímalønt arbeiði.

**Funksjónsviðbót**
Arbeiðsgevarin kann geva eina uppgávurelateraða, tíðaravmarkaða viðbót, tá ið støðan á arbeiðsplássinum er serlig og nakað eyka verður kravt av starvsfólkunum. Viðbótin skal minst verða 1.000 kr. og hægst 2.000 kr. um mánaðin, og tíðarskeiðið ein kann fáa viðbót, skal hægst vera 9 mánaðir hvørja ferð. Arbeiðsgevarin skal kunna Heilsurøktarafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, tá ið viðbót verður latin.

**DAT-toymið**
Heilsurøktarar, sum eru partur av DAT-toyminum á psykiatriska deplinum, fáa eina mánaðarliga viðbót á kr. 2.000,-.” Ásetingin er galdandi frá 1. oktober 2016.

**Frítíðarlegugjald:**
Tá ið starvsfólk luttaka á summarfrítíðarlegu við sjúklingum verður veitt eitt legugjald uppá kr. 275 fyri yrkadagar og kr. 550 fyri sunnu- og halgidagar.
Tíðin verður uppgjørd soleiðis: Undir hálvt samdøgur er hálvt gjald og yvir hálvt samdøgur er fult gjald. Gjaldið hoyri til tað samdøgrið, har flest tímar liggja.
Treytin fyri at nýta hesa avtalu er, at talan er um eina frammanundan avtalaða avmarkaða tíð, og veruliga er talan um leguhald.

**Bólkaleiðari:**
Verður starvsfólk sett sum bólkaleiðari, verður veitt viðbót sum er kr. 1000 fyri smærru økini og kr. 1750 fyri stóru økini. Hon verður veitt fyri ábyrgd og vansar, sum fylgja við starvinum, so sum at svara telefon eisini heima og er ikki samsvarandi setanarbrøkinum.

**Leggja lík í kistu:**
Á kommunalum arbeiðsplássum verður viðbót givin fyri at gera lík í stand og leggja tað í kistu.
Viðbótin er:
frá kl. 07 - 23: 140 kr. hvørja ferð.
frá kl. 23 - 07: 250 kr. hvørja ferð.

**Handgivin andadráttarhjálp, neyðsend o.a.**
Tá ið starvsfólk hjálpir til at veita sjúklingum handgivna andadráttarhjálp, og tá ið røkt av sjúklingum kann vera starvsfólki at bága, t.d. við avkølingarviðgerð ella hitastráling, verður hvor arbeiðstími roknaður sum 1 1/4 tími. Tá ið starvsfólk er til hjálpar í neyðsend við sjúkrabili ella tyrlu, fær tað eina samsýning upp á kr. 500,00.

**Praktikkvegleiðarar:**
Starvsfólk, sum hava lokið prógv sum praktikkvegleiðarar, fáa kr. 1250,- um mánaðin í viðbót ta tíðarskeiðið tey virka sum praktikkvegleiðarar. Er sum undantak neyðugt at nýta praktikkvegleiðara, sum ikki hevur lokið prógv, er viðbótin kr. 750,- um mánaðin. Henda viðbótin er ikki samsvarandi setanarbrøkinum.

**§ 6. Eftirløn**
Sáttmálasett starvsfólk eru í eftirlønargrunni í Lív ella í eini eftirlønarskipan, sum partarnir gera serstaka semju um.
**Stk. 2.** Eftirlønargjaldið er eitt arbeiðsgevaragjald, sum er sambært galdandi lønartalvu og fyri meirtímar (tó ikki viðbøtur o.l.)
**Stk 3**. Starvsfólk, sett í starv aftaná 60 ára aldur, ið ikki ynskir upptøku í eftirlønargrunn, fær bruttølønina útgoldna.

**§ 7. Eftirsitiløn**
Sambært løgtingslóg um starvsmenn frá 20. mars 1958 við broytingum verður eftirsitandi hjúnafelaga/børnum veitt løn í sambandi við deyða.
**Stk. 2**. Tá ið stavsfólk doyr í tænastutíðini, eiga hjúnafelagi/samlivari ella børn undir 21 ár, sum tað uppiheldur rætt til løn samsvarandi uppsagnartíðini minst 3 mánaðir tó hægst 6 mánaðir. Eftirsitilønin er seinast útgoldna mánaðarlønin. Lønin í mánaðinum, tá ið starvsfólkið doyr, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina.

**§ 8. Lønarútgjalding**
Sáttmálalønt fáa lønina goldna aftrurút.
**Stk. 2.** Stovnurin greiðir eftirlønargjaldið við eftirlønargrunn sambært § 6.
**Stk. 3.** Øll starvsfólk hava rætt at fáa ein útgreinaðan lønarseðil.
**Stk. 4.** Lønin er sambart galdandi lønartalvu.
**Stk. 5.** Lønin verður útgoldin umleið 25. í mánaðinum.

**§ 9. Starvsaldur**
Starvsaldur er 2 ár á hvørjum lønarstigi.
**Stk. 2.** Starvsaldur verður roknaður fyri fastlønt, og um starvsfólk kann prógva minst 59 tíma arbeiði í einum mánaði, tó uttan at hava verið í føstum starvi, verður starvsaldur roknaður.
**Stk. 3.** Starvssetan minst 15 tímar um vikuna telur við sum fullur starvsaldur.
**Stk. 4.** Eftirútbúgving innan sjúkrarøktina telur starvsaldur.
**Stk. 5.** Hava starvsfólk arbeitt í útlondum ella innan øki, har ið hesin sáttmáli ikki er galdandi, skal starvsfólkið saman við nevnd í Heilsurøktarafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið áseta starvsaldur. Í slíkum førum skal avgerðin takast eftir tí, sum starvsfólkið hevur arbeitt við, og teimum royndum, sum starvsfólkið hevur innan hetta sáttmálaøkið.
**Stk. 6.** Tá starvsfólk fer úr starvi, hevur setanarstaðið skyldu at útskriva setanarkort. Starvsfólkið hevur skyldu at vísa setanarkortið hjá nýggjum arbeiðsgevara.
**Stk. 7.** Tá ið lønin hjá starvsfólki verður ásett, skal hon ásetast eftir, hvussu leingi viðkomandi hevur arbeitt sum mánaðarlønt starvsfólk innan fyri eitt øki, har hesin sáttmáli er galdandi.

**§ 10. Arbeiðstíð**

**a)** Vanlig arbeiðsvika er 40 tímar.
Hvussu arbeiðstíðin verður býtt út á dagarnar í vikuni avger stovnurin/arbeiðsplássið alt eftir, hvussu arbeiðsgongdin á viðkomandi stovni/arbeiðsplássi er. Arbeiðstíð út yvir 8 tímar um dagin ella út yvir tað, sum

avtalað er um fasta arbeiðstíð, verður at rokna sum yvirtíð.

**b)** Fyri hvørjar fullar 40 tímar sum kvøld- ella náttarbeiði eiga starvsfólk frí í 3 tímar. Sum kvøld- og náttarbeiði verður roknað arbeiði, ið er byrjað kl. 14.00 ella seinni, og sum endar seinni enn kl. 17.00. Hesar reglur galda fyri allar dagar í vikuni (yrkadagar, leygar-, sunnu- og halgidagar), men ikki fyri yvirtíð, vaktir og 24-tíma vaktir.

Vunnin frítíð skal mótroknast í fullum arbeiðsfríum døgum, t.e. døgum, ið annars áttu at verið arbeiðsdagar.

Um vunnin frítíð ikki er frígingin eftir 3 mánaðum, fella hesir tímar til útgjaldingar sum øll onnur innvunnin frítíð.

Tá ið starvsfólk fær arbeiðsfríar dagar, skal tann vunna frítíðin styttast við tí tímatali, sum viðkomandi annars sambært yvirlitstalvuni skuldi arbeitt.

**c)** Yvirlitstalva yvir arbeiðstíð verður kunngjørd soleiðis, at starvsfólk alla tíðina veit, nær arbeiðstíðin er, og skal vita minst 4 vikur frammanundan, nær tey hava frí. Hetta er tó ikki galdandi fyri avloysarar.

Broytingar í arbeiðstíðini kunnu gerast í samráð við starvsfólkið og bert undir serligum viðurskiftum (sjúku).

Yvirlit yvir frítíð orsakað av serstøkum arbeiði, t.d. yvirtíðararbeiði sunnu- og halgidagar o.a. skal kunngerast í seinasta lagi 72 tímar, áðrenn byrjað verður uppá tað arbeiði, sum liggur beint áðrenn byrjað verður uppá frídag.

**d)** Verður neyðugt at broyta vanligu arbeiðstíðina hjá starvsfólki (avloysarar undantiknir) í mun til ta upprunaliga ásettu arbeiðstíðina, verður tað fráboðað við minst 72 tíma freist. Verður henda freist ikki hildin, skal starvsfólkið hava kr. 23,25 um tíman fyri umlagdar tímar.

Broytt arbeiðstíð er at skilja sum tíð, tá ið starvsfólk ikki skuldi verið til arbeiðis, men sum eftir broytingini verður vanlig arbeiðstíð.

**Stk. 2.** Yvirtíðararbeiði

Yvirtíðararbeiði skal, alt tað ber til, samsýnast við frítíð, sum skal vera eins long og yvirtíðin, og við viðbót uppá 50% rundað uppeftir til heilar tímar. Er yvirtíðararbeiðið ikki samsýnt við frítíð, tá ið 3. mánaðurin er lokin, frá tí at yvirtíðararbeiðið var gjørt, verður løn útgoldin fyri yvirtíðararbeiðið við vanligari løn + 50%.

Tá starvsfólk verða sett til at arbeiða yvir, skulu tey hava boð um tað dagin fyri. Verður ikki fráboðað rættstundis, og yvirtíðararbeiðið varar meira enn 1 tíma, skal starvsfólkið hava varningsgjald á kr. 25,77.

**Stk. 3.** Parttíðarsett

Parttíðarstarvandi, sum arbeiða meira enn tað tímatal, ið avtalað er, og tá ið tað ikki verður roknað sum yvirtíðararbeiði, verða samsýnd í sama mun við frítíð. Hava tey ikki fingið hesa frítíð, tá ið 3 mánaðir eru farnir frá tí, at arbeiðið varð gjørt, fáa tey vanliga tímaløn uttan viðbót. Í teimum førum, tá ið ikki ber til at fríganga, kunnu stovnur/arbeiðspláss og álitisfólkið hjá einum bólki av starvsfólki gera avtalu um, at peningurin kann útgjaldast áðrenn omanfyri nevnda tíðarskeið er lokið. Arbeiði, sum ikki hoyrir undir vanliga arbeiðstíð á stovninum/arbeiðsplássinum sambært § 1, verður roknað sum yvirtíð.

Tá ein parttíðarstarvandi verður settur til at gera meira arbeiði enn upprunaliga avtalað, skal hann hava boð um tað dagin fyri. Verður ikki fráboðað rættstundis, og yvirtíðararbeiðið varar meira enn ein tíma, skal starvsfólkið hava varningsgjald á kr. 25,77.

**Stk. 4.** Frídagar

Starvsfólk hava rætt til ein frídag um vikuna, og hesar dagar kann ikki verða álagt teimum tilkallivakt sambært § 11.

Arbeiðstíðin verður løgd eftir niðanfyri standandi reglum:

**a)** Frídagarnir í vikuni skulu, tó ikki teir, sum nevndir eru undir pkt. b), vera minst 64 tímar út í eitt, tó verða teir roknaðir sum givnir frídagar, um frítíðin bert hevur verið millum 55 og 64 tímar.
**b)** Har viðurskiftini gera, at frídagarnir í vikuni ikki, ella ikki allir, kunnu hava ta longd, sum nevnt undir pkt. a), kunnu í staðin fyri hvønn frídag verða givnir 2 frídagar. Hesir frídagar skulu vera minst 40 tímar til longdar, men kunnu tó roknast sum givnir, um frítíðin bert hevur verið 35 til 40 tímar til longdar.
**c)** Verða 2 ella fleiri frídagar við longd, sum nevnt undir pkt. a) samanlagdir, skal tann fyrsti lúka treytirnar undir pkt. a), meðan hinir skulu vara 48 tímar.
**d)** Verður ein frídagur við longd sum nevnt undir pkt. a) lagdur saman við frídøgum við longd, sum nevnt undir pkt. b), skal tann fyrsti frídagurin lúka krøvini undir pkt. a), meðan hinir frídagarnir skulu vera 24 tímar til longdar.
**e)** Verða 2 ella fleiri frídagar við longd, sum nevnt undir pkt. b) samanlagdir, skulu tveir teir fyrstu tilsamans hava longd, sum nevnt undir pkt. a), meðan hinir skulu vera 24 tímar til longdar.
Verður ein frídagur av serligum orsøkum tikin aftur, verður so skjótt sum til ber sum samsýning givin meira frítíð, sum svarar til 50 % av tí arbeiðinum, sum gjørt varð á tí styttsta frídegnum rundað uppeftir til heilar tímar. Er ikki veitt endurgjald fyri mista frítíð, tá ið 3. mánaðurin er lokin frá tí, at frídagarnir vóru mistir, skulu teir endurgjaldast sambært reglunum í § 10, stk.2.
**f)** Miðað verður fram ímóti, at frídagarnir verða lagdir soleiðis til rættis, at starvsfólk fáa frí 2. hvørt vikuskifti (leygardag og sunnudag).
Stk. 5. Skeivir halgidagar
Starvsfólk hava eisini rætt til frítíð teir halgidagar, sum ikki eru sunnudagar, ella rætt til endurgjald svarandi til frítíð á annan hátt. Er henda frítíð ikki givin, tá ið 3. mánaðurin er lokin frá tí, at arbeitt var halgidag, verður endurgjald latið í peningi sambært stk.4.

1. Onnur frítíð verður givin undir hesum umstøðum:
   a) Vanlig tænasta, tilkallivakt/24 tímars vakt á skeivum halgidegi.
   b) Vikufrísamdøgur ella onnur frítíð sambært § 10, stk.4.

2. Hetta er tó ikki galdandi í hesum førum:
   a) Skeivur halgidagur fellur á vikufrísamdøgur, tá starvsfólkið altíð hevur frí.
   b) Parttíðarsett, sum avtala er gjørd við um føst arbeiðsskeið, og tá skeivur halgidagur fellur á tað fasta ásetta vikufrísamdøgrið í tí arbeiðsfríu vikuni.

**Stk. 6.** Uppkall
Tey, sum sett eru í arbeiði uttan at teimum er álagt tilkallivakt sambært § 11, og sum verða biðin at koma til arbeiðis uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, fáa løn sum fyri yvirtíð, sambært stk. 1, tó í minsta lagi fyri 3 tímar. Fyri arbeiði meira enn 3 tímar verður goldin yvirtíðarløn fyri hvønn byrjaðan tíma og verða starvsfólk biðin fleiri ferðir til arbeiðis innan fyri 3 tímar, fáa tey tó bert fyri 3 yvirtímar.
Verða starvsfólk biðin at koma til arbeiðis ein frídag, er støðan sum við frátøku av einum frídegi sambært stk. 4 fyri tann partin av frítíðini, sum liggur innanfyri 24 tímar, áðrenn aftur skal farast til arbeiðis.
Gongur frítíðin yvir fleiri tíðarskeið á 24 tímar, verður í hvørjum tíðarskeiði sær gjørt samsvarandi tí, sum nevnt er í øðrum petti.
Endurgjald - frítíð ella løn - verður latið fyri minst 6 tímar. Fyri fleiri boðsendingar

innanfyri 6 tímar eftir fyrstu boðsending verður ikki givin eyka frítíð/løn. Verður onnur boðsending ikki givin fyrr enn 6 tímar eftir fyrstu boðsending verður goldið sambært fyrsta petti.
**Stk. 7.** Sunnu- og halgidagar
Sunnudagsarbeiði og arbeiði halgidagar, sum ikki eru sunnudagar, verður samsýnt við ½ tíma fyri hvønn arbeiðstíma. Er endurgjaldsfrítíð ikki givin, tá ið 3. mánaðurin er lokin frá tí, at arbeitt var sunnu- ella halgidag, verður latið endurgjald svarandi til 50% av tímalønini í dagtænastu sambært § 10, stk. 1 og 2. Nevnda samsýning verður eisini givin fyri yvirtímar sambært stk. 2, um arbeitt verður nevndu dagar.
Starvsfólk (burtursæð frá starvsfólki, ið eru sett til sunnudagstænastu), sum í einum ársfjórðingi (jan.-mars, apríl-juni, juli-sept., okt.-des.) verður álagt at arbeiða meira enn 6 sunnudagar, fáa eyka samsýning fyri hesar sunnudagar, svarandi til helvtina av vanligu samsýningini, sambært petti 1.
**Stk. 8.** Leygardagar
Fyri arbeiði leygardagar í tíðarbilinum kl. 06.00 til 24.00 og mánadagar í tíðarbilinum frá midnátt til dagvaktin byrjar, verður útgoldið eitt gjald svarandi til 27,5% av tímalønini í dagtænastuni. Omanfyri nevndu gjøld verða eisini goldin fyri yvirtímar, sambært stk. 2, sum falla innan fyri nevndu tíðarbil.
**Stk. 9. Kvøld- og náttarbeiði**
Fyri arbeiði í tíðarskeiðinum millum kl.17.00 og kl. 23.00, verður útgoldið eitt gjald svarandi til 23% av tímalønini í dagtænastuni og arbeiði millum kl. 23.00 og kl. 06.00 verður útgoldið eitt gjald svarandi til 35% av tímalønini í dagtænastuni.
Nevndu gjøld verða eisini goldin fyri yvirtíðartímar sambært stk. 2, sum falla í somu tíðarbilum.
Til starvsfólk, sum í einum ársfjórðingi (jan.-mars, apríl-juni, juli-sept., okt.-des.) arbeiða meira enn 31 kvøld- og/ella náttarbeiði, verður fyri hesi meirarbeiði millum kl. 17.00 og kl. 06.00 goldið eitt gjald aftrat, sum svarar til helvtina av tí vanliga gjaldinum sambært petti 1. Henda regla er tó ikki galdandi fyri tey, sum bert eru sett til kvøld- og/ella náttarbeiði.

## YVIRLIT YVIR FRÍDAGAR

### A. Frídagar

Nýggjársdagur
Skírisdagur
Langafríggjadagur
Páskaaftan
2. Páskadagur
Dýri biðidagur
Kristi himmalferðardagur
Hvítusunnuaftan
2. Hvítusunnudagur
Flaggdagur
Ólavsøkudagur
Jólaaftan

1. Jóladagur
2. Jóladagur
Nýggjársaftan

**B. Frídagur aftaná kl. 12**
Grundlógardagur
Ólavsøkuaftan

**§ 11. Tilkallað vakt**
Starvsfólki kann verða álagt hesi sløg av tilkallaðari vakt:
**1)** tilkallað vakt heima
**2)** tilkallað vakt á vaktarstovu.
Starvsfólk skulu møta beint, sum tey eru boðsend at koma.
**Stk. 2.** Starvsfólki kann eisini verða álagt tilkallaða vakt, sum nevnt í stk. 1 eitt samdøgur (24-tíma vakt) teir dagar, sum ikki eru fullir arbeiðsdagar (helst sunnu- og halgidagar).
**Stk. 3.** Tilkallað vakt (tó ikki 24-tíma vakt, sambært stk. 4) er partur av vanligu vikuarbeiðstíðini, sambært § 10, stk. 1 a) við hesum virðum:
Vakt.I: 1/3 tíma
Vakt II: 3/4 tíma.
**Stk. 4.** 24 tíma vakt er partur av vanligu vikuarbeiðstíðini sambært § 10, stk. 1 a), við hesum virðum:
Vakt I: 14 tímar
Vakt II: 20 tímar.
**Stk. 5.** Verður neyðugt at gera frávik í arbeiðstíðini frá tí sum upprunaliga er avtalað, skal starvsfólkið (tó ikki avloysarar) hava boð um tað í minsta lagi 72 tímar frammanundan. Verður henda freist ikki hildin, verður fyri hvønn tíma, starvsfólk er til taks, heruppií roknaðir tímar við effektivum arbeiði, veitt viðbót, svarandi til helvtina av viðbótum, ið nevndar eru í § 10, stk. 1 d).
**Stk. 6.** Fyri ta tíð roknað frá boðsending, tá ið effektivt arbeiði verður gjørt á tilkallaðari vakt (24-tíma vakt undantikin, sambært stk. 7), verður samsýnt við frí sum fyri yvirtíðararbeiði ella við yvirtíðarløn, sambært § 10, stk. 2, 1. petti, minkað við teimum virðum, sum nevnd eru í stk. 3. Harafturat galda ásetingarnar í § 10, stk. 7-9. Hvør boðsending telur sum minst 1 tíma arbeiði. Boðsending verður lønt fyri hvønn byrjaðan tíma við effektivum arbeiði. Fyri fleiri boðsendingar innan fyri sama tíma verður tó bert samsýnt við frí, við yvirtíð ella yvirtíðarløn fyri ein tíma.
**Stk. 7.** Fyri 24-tíma vaktir sambært stk. 2 galda hesar reglur:
**a)** Fyri 8 teir fyrstu tímarnar við effektivum arbeiði verður ikki veitt eyka frítíð ella løn.
**b)** Fyri effektivt arbeiði meira enn 8 tímar verður veitt frítíð sum fyri yvirtíðararbeiði ella yvirtíðarløn smb. § 10, stk. 2, 1. petti.
**c)** Ásetingarnar í § 10, stk. 7-9 galda fyri boðsendingar sambært pkt. a) og pkt. b).
**d)** Effektivt arbeiði í 24-tíma vaktum verður uppgjørt sum nevnt í stk. 6, 2. petti.
**Stk. 8.** Tá ið tænastulistin sambært § 10, stk. 1 c) verður gjørdur, verður miðað ímóti, at starvsfólk ikki beint aftaná tilkallaða vakt verða sett til vanligt arbeiði, hvørki dagarbeiði ella 24-tíma vakt.
Verður kortini álagt starvsfólki at hava vanligt arbeiði ella 24-tíma vakt beint aftaná tilkallaða vakt, og tey hava ikki havt hvíld á tilkallaðu vaktini, sum svarar til minst helvtina av tilkallaðu vakttíðini (fyri 24-tíma vakt tó 11 tímar), harav minst 4 tímar skulu falla millum kl. 23.00 og byrjan av komandi tænastu, skulu tey ikki byrja

dagarbeiði ella 24-tíma vakt, fyrr enn tey hava fingið 8 tíma samanhangandi hvíld roknað frá seinastu boðsending í vaktartíðini. Fyri teir tímar, sum starvsfólk av hesi orsøk ikki eru til arbeiðis dagin eftir, verður tíð drigin frá fyri hvønn tíma, tey skuldu verið til arbeiðis. Fyri 24-tíma vakt verður tó drigið frá við teimum virðum um tíman, sum nevnd eru í stk. 3 í hesi grein. Tann frádrigna tíðin verður antin roknað frá í arbeiðstíðaruppgerðini ella í uppgerð fyri yvirtíð o.a.
Hvíldartíð á tilkallaðari vakt, ið nevnd er í 2. petti, verður roknað sum tilkallitímar við frádrátti av boðnum eftir reglum sum nevnt í stk. 6, 2. petti.

**§ 12. Frítíðarreglur**
Mánaðarløntum starvsfólki er lógarfest frítíð sambært løgtingslóg nr. 30 frá 01.04.1986 um frítíð við løn við broytingum.
**Stk. 2**. Starvsfólk eiga rætt til serstakt frítíðargjald svarandi til 1,5% av allari føstu árslønini og 12% av øllum útgoldnum viðbótum og úrtíðarløn í undanfarna innvinningarári. Hesi gjøld verða at gjalda í seinasta lagi, tá frítíðin byrjar. Nevnda 1,5% frítíðargjald verður ikki goldið, tá farið verður úr starvi, men ístaðin verður frítíðargjald 12% goldið av allari lønini undanfarna innvinningarár.
**Stk. 3.** Frítíð verður bert hildin í heilum arbeiðsfríum døgum. Svarar vunnin frítíð til brotpartar av einum degi, kann tíðin leggjast saman við aðrari vunnari frítíð.
**Stk. 4.** Sjúkradagar í frítíð verða vanliga viðroknaðir sum frígongudagar. Tó kunnu eftir umsókn í serligum førum, har sjúka forðar fyri nýtslu av frítíðini á rímiligan hátt, slíkir sjúkradagar koma undir reglurnar fyri sjúku, og nýggir frídagar verða givnir. Um starvsfólk er óarbeiðsført, tá frítíðin byrjar, verða tó altíð latnir eyka frídagar. Somu reglur verða galdandi í sambandi við sjúku undir avspáking.
**Stk. 5.** Stovnurin ásetur, nær frítíðin skal vera. Stovnurin skal, so vítt arbeiðsumstøðurnar loyva tí, ganga ynskjum starvsfólksins um, nær frítíðin hjá tí einstaka skal vera á møti. Heilsurøktari skal, sum meginreglu, hava fráboðan um summarfrí í seinasta lagi 3 mðr. áðrenn frítíðin byrjar.

**§ 13. Sjúkraflutningur**
Ferðing við sjúklingi uttanlands.
Ferðatíð verður roknað sum 2 arbeiðsdagar. Um arbeiðstíðin, t.v.s. frá fráfaringartíð av arbeiðsplássinum í Føroyum til sjúklingurin er innskrivaður á sjúkrahús uttanlands, fer út um 8 tímar, skal hetta gjaldast sum úrtíð.
Um ikki slepst heimaftur t.d. vegna ringt veður, ferðaseðlar útseldir, verður henda tíð roknað sum vanligur arbeiðsdagur. Starvsfólk, ið eftir ætlanini skuldu havt kvøld- ella tilkallivakt, missa ikki hesa viðbót.
**Stk. 2**. Tíma/dagpeningur verður goldin frá fráfaringartíðini av sjúkrahúsinum til starvsfólkið er heima aftur, tó altíð minst 2 samdøgur. Um starvsfólk ynskja hetta, kann ávísast innivist, og skal hetta gjaldast av sjúkrahúsinum áðrenn fráferð. Annars verður goldið sambært galdandi reglum.
**Stk. 3**. Hýruvognur kann nýtast frá sjúkrahúsinum til gistingarhús (innivist) innan fyri 15 km frá sjúkrahúsinum.
**Stk. 4**. Í sambandi við sjúkraflutning skal starvsfólk vera tryggjað við skipi, bili, bussi, tyrlu og flogfari.
**Stk. 5**. Tíma/dagpeningur fyri ferðing innanoyggja.
Dagpeningur verður roknaður fyri hvørt samdøgur, sum viðkomandi er burturstaddur. Fyri minni enn samdøgur, men meir enn 4 tímar, verður tímapeningur roknaður fyri hvønn ásettan tíma, tó ikki útyvir dagpening fyri samdøgur.

Náttarviðbót verður veitt fyri at hava ligið nátt burtur frá tænastustaði, um innivist ikki er ávíst av arbeiðsgevaranum.
Annars verður goldið sambært galdandi reglum.
**Stk. 6**. Bæði út- og heimferð eru roknað sum arbeiðstíð.
**Stk. 7**. Steðgur upp til 3 tímar áðrenn heimferð er roknaður við í arbeiðstíðina.

**§ 14. Tænastubúni**
Starvsfólk fáa ókeypis tænastubúna. Har hetta ikki er gjørligt, verður givið kr. 1.920,00 árliga. Er ókeypis vask á arbeiðsstaðnum, verður latin árlig viðbót kr. 840,00.

**§ 15. Frálæra**
Starvsfólk, ið ikki eru sett við skúla, hava rætt til serligt gjald fyri undirvísing og fyrireiking av frálæru eftir hesum reglum:
1) Liggur fyrireiking og frálæra í arbeiðstíðini, fæst einki endurgjald.
2) Liggur frálæra í vanligari arbeiðstíð, og fyrireiking uttan fyri arbeiðstíð, verður endurgoldin hálv tímaløn fyri ta tíð frálæran varir.
3) Liggur frálæra eftir arbeiðstíð, verður endurgoldið fyri teir tímar frálæran varir.
4) Fyri hvørjar seks stílar ella uppgávur, sum verða rættaðir, verður goldin ein frálærutími.
**Stk. 2.** Goldin verður tímaløn 215,28 kr. umframt 12% í frítíðarløn.
**Stk. 3.** Fyri frálæru til heilsurøktarar er tímalønin 418,27 kr. umframt 12% í frítíðarløn.
**Stk. 4.** Fyri frálæru til aðrar fakbólkar, verða goldnar 341,02 kr. um tíman umframt 12% í frítíðarløn.
**Stk. 5.** Frálæra, ið verður givin um kvøldið, t.e. aftaná kl. 17.00, verður samsýnd eftir § 15, stk. 1 - 4 umframt eitt ískoyti uppá 20 %.
**Stk. 6.** Tá ið heilsurøktarar halda fyrilestur er lønin 1.048,39 kr. fyri tann fyrsta tíman og 440,10 kr. fyri hvønn fylgjandi tíma.

**§ 16. Eftirútbúgving**
Tá starvsfólk søkir um at koma á eftirútbúgvingarskeið fyri at halda útbúgvingina við líka, skal umsóknin viðgerðast við vælvild. Allar útreiðslur í hesum sambandi verða goldnar av arbeiðsgevaranum.
**Stk. 2.** Fyri skeið, sum leiðslan áleggur starvsfólkunum at luttaka á, verður hvør einstakur skeiðdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur tó í mesta lagi 8 tímar. Um skeið liggur á degi, har starvsfólkið longu hevur arbeitt tímanormin, verður skeiðtíðin tald við í skyldugu arbeiðstíðina tó við hægst 4 eykatímum útyvir dagtímanormin. Um skeið liggur í vikuskifti ella á føstum frídegi eftir § 10, stk. 9 A og B, verður latin tímasamsýning fyri ólagaligu tíðina sambært § 10.
Skeiðtíðin verður harumframt tald við í skyldugu arbeiðstíðina tó við í mesta lagi 8 tímum hvønn skeiðdagin.
**Stk. 3.** Fyri skeið, sum liggja uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, og sum eru ikki áløgd, kann stovnurin lata aðra frítíð tíma fyri tíma í staðin fyri tíðina, ið er nýtt til skeiðluttøku.
**Stk. 4.** Ferðing til skeið, sum liggja aðrastaðni enn vanliga arbeiðsstaðið (uttanbíggja og í útlondum), verður roknað í skeiðstíðina.
**Stk. 5.** Ásetingarnar í stk. 2 - 4 kunnu við avtalu millum starvsfólk og stovnin

frávíkjast, men ger tílík avtala, at stovnurin verður stillaður verri arbeiðsliga ella kostnaðarliga, skal Kommunala Arbeiðsgevarafelagið góðkenna hana.

**§ 17. Farloyvi**
Starvsfólk kunnu fáa farloyvi, tá ið tað ikki nervar arbeiðið á stovninum. Farloyvi kann verða játtað upp til eitt ár í senn, tó í mesta lagi 5 ár. Setanarstaðið hevur ábyrgd av at hava starvið leyst til viðkomandi, tá ið farloyvið er úti.

**§ 18. Sjúka**
Mánaðarlønt hava rætt til løn í samband við sjúku sambært lóg nr. 13 frá 20. mars 1958 "Løgtingslóg um starvsmenn" við seinni broytingum.
**Stk. 2.** Starvsfólk hava rætt til frí í samband við, at børn eru sjúk, uttan lønarmiss. Hetta er galdandi fyri 1. sjúkradag hjá barninum.
**Stk. 3.** Um starvsfólk sjúkrameldar seg á frígongudegi, skal dagurin roknast sum frígingin.
Um starvsfólk sjúkrameldar seg, áðrenn frígongudagurin er byrjaður, verður tíðin at rokna sum sjúkradagur.

**§ 19. Barnsburðarfarloyvi**
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga. Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði við løn í 24 vikur tilsamans at rokna frá tí, at starvskvinnan gerst óarbeiðsfør, tó í fyrsta lagi 8 vikur undan mettum barnsburði. Frá 14. viku eftir barnsburð kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

Ættleiðing:
Starvsfólk, ið ættleiðir barn, hevur rætt til fráveru við løn í upp í 4 vikur áðrenn hon/hann fær barnið og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til barsilsfarloyvi við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.

Farloyvi við ongari løn:
Herumframt hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur, soleiðis at skeiðini tilsamans fyri foreldrini eru upp í 52 vikur eftir føðing.

Stk. 2. Er 120-daga reglan avtalað, verður sjúka í sambandi við viðgongutíð ikki tald uppí.

**§ 20. Uppsøgn**
Uppsøgn millum partarnar er uppsagnarfreistin sambært starvsmannalógini.
**Stk. 2.** Verður talan um at siga starvsfólki úr starvi, er skylda setanarmyndugleikans at

geva Heilsurøktarafelagnum skrivlig boð um uppsøgnina við nágreiniligari grundgeving og eisini avvarðandi starvsfólki, sum tó ikki skal hava uppsøgnina, fyrr enn Heilsurøktarafelagið innan 2 vikur hevur ummælt uppsøgnina.
**Stk. 3.** Metir Heilsurøktarafelagið uppsøgnina órímiliga, kann felagið innan ein mánað eftir, at uppsøgnin er givin, krevja fund millum avvarðandi setanarmyndugleikar, tann uppsagda og felagið.
**Stk. 4.** Fæst ikki semja á fundinum, kann málið innan 1 mánað verða viðgjørt í eini uppsagnarnevnd, har Heilsurøktarafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið velja 2 limir hvør, tó kunnu partarnir í smærri málum, um teir semjast um tað, velja ein lim hvør. Í felag velja partarnir 5.(3.) limin, ástøðumannin. Fæst ikki semja um 5.(3.) limin, skal hann útnevnast av Føroya Rætti. Nevndin skipar sjálv fyri arbeiðshátti sínum. Uppsagnarnevndin kann avhoyra partarnar og vitni.
**Stk. 5.** Nevndin ger ein úrskurð í seinasta lagi 1 mánað eftir, at málið er lagt fyri nevndina. Úrskurðurin skal sendast Heilsurøktarafelagnum og Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum. Nevndin ásetir, hvør skal rinda útreiðslurnar í sambandi við nevndarviðgerðina.
**Stk. 6.** Um so er, at starvsfólk eftir leiðslunar meting ikki røkir tænastuskyldur sínar, eigur starvsfólkið í fyrstu syftu at fáa eina munnliga ávaring. Tá ávaringin verður kunngjørd, skal álitisfólkið á staðnum vera hjástatt. Eftir hesa munnligu ávaringina hevur viðkomandi rætt til at fáa at vita grundina til ávaringina og fær frá tí tíðarskeiði eina freist, áðrenn ein skrivlig ávaring kann verða givin viðkomandi og send felagnum við nágreiniligari grundgeving.
Tá uppsøgn verður givin, skal hon sendast viðkomandi skrivliga. Reglan í hesum stykki er ikki galdandi, um starvsfólk hevur framt groft misbrot í tænastuni.
Áðrenn uppsøgn uttan umsókn verður givin, skal stovnurin senda felagnum fráboðan.
**Stk. 7.** Er sparing orsøk til uppsøgn, skal arbeiðsgevarin síggja til, at fólk í leysum starvi fyrst verða uppsøgd.
**Stk. 8.** Uppsagnarfreistin hjá álitisfólkum verður longd við 3 mánaðum.

## § 21. Broyting í arbeiðsgongd v.m.

Tá avgerandi broytingar verða gjørdar í arbeiðsgongdini ella umsitingini á einum stovni, ella nýggj tøknifrøði verður tikin í nýtslu, skal samstarvsnevndin hava boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi at vera við í tilrættaleggingini. Krevja tílík tiltøk eftirútbúgving/skeið, skulu starvsfólk á avvarðandi stovni hava høvi til at fáa tað sum krevst fyri, at tey kunnu røkja hesi størv.
**Stk. 2.** Álitisumboðið skal hava skipanar reglur fyri viðkomandi stovn. Álitisumboðið skal eisini takast við í ráðleggingini, tá broytingar verða gjørdar sæmbart stk.1.

## § 22. Tímalønt starvsfólk

Starvsfólk, ið ikki eru sett í fast starv, fáa tímaløn. Tímalønin roknast í dagtímum sum 1/2080, og í kvøld/náttarvaktum 1/1924, svarandi til starvsaldur av nettoárslønini hjá starvsfólkinum.
**Stk. 2.** Tímalønt, har eingin avtala er gjørd, hava rætt til avrokning eina ferð um vikuna.
Letur útgjaldan seg ikki gera í endanum av arbeiðstíðini, kann tímalønti eftir avtalu fáa lønina sendandi.
Tímalønt hava rætt til útgreinaðan lønarseðil.
Tímalønt hava rætt til fast starv, um tilrættislagt arbeiði er í einum álmanakkamánaði.
**Stk. 3.** Tímalønt fáa ikki viðbót fyri kvøld/náttarvakt (3 tímar fyri 40 tímar). Viðbót er

roknað í kvøld/náttar tímalønina.
**Stk. 4.** Tímalønt fáa ókeypis tænastubúna. Har hetta ikki er gjørligt, verður veitt ein viðbót uppá 0,92 kr. um tíman.
**Stk. 5.** Starvsaldur verður roknaður fyri tímalønt arbeiði, um starvsfólk kann prógva minst 59 tíma arbeiði í einum mánaði, uttan at hava verið í føstum starvi.
**Stk. 6**. Tá ið starvsfólk verður sett í tímalønt starv, verður starvsaldurin ásettur sambært reglunum í grein 9.

**Arbeiðstíð:**
Í sambandi við
gr. 10, stk. 1: arbeiðstíð
gr. 10, stk. 2: yvirtíð
gr. 10, stk. 7: sunnu- og halgidagsarbeiði
gr. 10, stk. 8: eykagjald fyri tænastu leygar- og mánadagar
gr. 10, stk. 9: eykagjald fyri tænastu millum kl. 17.00 og kl. 6.00
gr. 11: tilkallivakt
gr. 5: ásetanir viðvíkjandi handgivnari andadráttarhjálp, neyðsend o.a. galda somu reglur fyri tímalønt sum fyri mánaðarlønt.
**Stk. 2**. Tímalønt, sum hava arbeitt í 6 fylgjandi dagar (her uppí roknaðir teir frídagar, sum eru fastlagdir sambært § 10, stk. 4), áðrenn og í sambandi við ein halgidag, hava fyri halgidagsarbeiði rætt partvíst til vanliga løn fyri teir tímarnar, sum arbeitt er, partvíst samsýning pr. tíma útroknað eftir sama grundarlag, sum mánaðarlønt fáa samsýning fyri mistar frídagar, sambært § 10, stk. 4.
Tímalønt, ið hava minni enn 6 arbeiðsdagar beint undan halgidegi, hava bert rætt til frammanfyri nevndu samsýning pr. tíma. Sama er galdandi fyri yvirtíð.
**Stk. 3**. Er arbeiðstíðin á eini deild styttri enn tað, sum er ásett sum vanlig arbeiðstíð á stovninum, hevur starvsfólkið skyldu til at gera annað arbeiði á stovninum sum er umfatað av teirra setanarøki. Yvirtíð verður bert goldin fyri teir tímar, ið arbeitt er út um ta ásettu tíðina.
**Stk. 4**. Er avtalað arbeiðstímatal við starvsfólk, og stovnurin hevur ikki nóg mikið arbeiði til tað, hevur tann tímalønti, um ikki stovnurin hevur givið starvsfólkinum boð minst 4 tímar áðrenn arbeiðið skal byrja - rætt til løn fyri teir tímarnar, sum avtalað varð, at starvsfólkið skuldi arbeiða henda dagin.
**Stk. 5**. Starvsfólk, sum verður kallað til arbeiðis, har tað ikki eftir arbeiðsætlanini skuldi møta, fær løn fyri alla vaktina.

**Uppsøgn, sjúka, frítíð o.a.:**
Fyri tímalønt, sambært § 22, stk. 1, er uppsagnarfreistin 2 dagar fyri hvønn fullan mánað, ið arbeitt er.
**Stk. 2**. Tímalønt, sum biðin verða til arbeiði, sum avmarkað er í tíð, skulu, um tey gerast sjúk fyri tíðina, sum arbeiðið var ætlað, hava somu rættindi sum fastlønt sambært grein 18.
**Stk. 3**. Tímalønt hava rætt (og skyldu) til ein frídag uttan løn fyri hvørjar 6 dagar, arbeitt er út í eitt; tó kunnu frídagarnir flytast orsakað av arbeiðsgongdini á stovninum.

**§ 23. Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. oktober 2015 og kunnu partarnir siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober í 2017.
**Stk. 2**. Tá ið uppsøgnin av sáttmálanum fær gildi og til nýggjur sáttmáli tekur við, verða starvsfólk fyribils lønt eftir tí avtalu, sum var í gildi síðsta dag, sáttmálin var galdandi.

Tórshavn tann 5. oktober 2016

Heilsurøktarafelagið Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Avtala um fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi

## millum
## Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Heilsurøktarafelagið

Í Ll nr. 39, frá 13 mai 2013 um semingsstovn, er ásett í § 7, ”Partarnir hava skyldu at áseta sínamillum reglur í áhugatrætum, herundir í minsta lagi fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi.”

Partarnir í sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Heilsurøktarafelagið viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum at lýsa og seta í verk arbeiðssteðg eftir ásetingunum niðanfyri.

Stk. 2. Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhugaarbeiðssteðg, skal vera skrivlig og latin mótpartinum minst 48 tímar undan arbeiðssteðginum.

Stk. 3. Fráboðanin skal greitt siga frá, hvønn arbeiðssteðg, talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.

Stk. 4. Arbeiðssteðgur kann ikki verða fráboðaður, meðan sáttmálin er í gildi. Er sáttmálin farin úr gildi, kann arbeiðssteðgur ikki verða fráboðaður, fyrr enn samráðingar um nýggjan sáttmála eru endaðar. Er semingsstovnurin komin uppí, ella er semingsstovnurin boðsendur, eru samráðingarnar at meta sum endaðar, tá ið semingsstovnurin er givin við semingsroyndini, og hevur boðað frá tí.

Stk. 5. Hendan avtalan kann verða søgd upp saman við sáttmálunum partanna millum, við somu freist og fráboðan. Avtalan kann tó bara verða ógildað við nýggjari avtalu.

Stk. 7. Hendan avtalan fær gildi frá 1. januar í 2017.

*Í Tórshavn 5. oktober 2016*

Heilsurøktarafelagið | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Álitisfólkaskipan**

**Stk. 1.** Á einum arbeiðsplássi hava starvsfólkini rætt til at velja eitt álitisfólk og varaálitisfólk um viðkomandi umboðar minst 5(3) starvsfólk sett eftir hesum sáttmála.
**Stk. 2.** Til álitisfólk kunnu bert velja tey, ið hava fulltíðarstarv (alt. arbeiða sum fastlønt).
**Stk. 3.** Valið hevur ikki gildi, fyrr enn felagið hevur góðkent tað og boðað leiðsluni á avvarðandi stovni frá. Henda fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið. Avvarðandi stovnur hevur rætt at mótmala valinum til felagið, um hetta hendir innan 14 dagar eftir, at avvarðandi stovnur hevur fingið valúrslitið. Hvørja ferð álitisfólk verður valt, kann stovnurin tó bara mótmæla tvær ferðir.
**Stk. 4.** Álitisfólkið hevur skyldu til at ansa eftir at lógir, sáttmálar, fyriskipanir, mattíðir o.a. ið er galdandi fyri arbeiðsplássið, sum heild verða hildin og skal virka fyri best møguligum samarbeiði starvsfólkanna og leiðslunnar millum.
**Stk. 5.** Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við deildar- og stovnsleiðsluna um øll mál, sum felagið og starvsfólkið á avvarðandi arbeiðsplássi áleggja álitisfólkinum.
**Stk. 6.** Eru álitisfólkið og starvsfólk ikki nøgd við avgerð leiðslunnar eftir loknar samráðingar, skal málið leggjast fyri felagið.
**Stk. 7.** Tá ið talan er um setan ella uppsøgn av starvsfólki, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á avvarðandi arbeiðsplássi. Verða partarnir ikki samdir, skal málið leggjast fyri felagið.
**Stk. 8.** Álitisfólkið skal – í samráð við stovnin – í arbeiðstíðini hava møguleika at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgum ella arbeiðsviðurskiftum á avvarðandi arbeiðsplássi.
Tá álitisfólk søkja um at koma á álitisfólkaskeið, skulu umsóknir viðgerast við valvild.
**Stk. 9.** Um starvsfólk er valt í nevnd í felagnum, skal tað hava rætt til at gera felagsarbeiði í arbeiðstíðini – við løn. Um felagsarbeiði fellur á ein frídag, verður givin ein nýggjur frídagur.
**Stk. 10.** Verður álitisfólk uppsagt, skal uppsøgnin viðgerast millum felagið og arbeiðsgevaran.
Við uppsøgnini skal fylgja holl skrivlig grundgeving fyri uppsøgnini. Henda grundgeving verður grundarlagið undir fundinum millum felagið og arbeiðsgevaran.
Metir felagið uppsøgnina ógrundaða, skal álitisfólkið halda fram í starvinum sum álitisfólk.
Verjan hjá álitisfólki heldur áfram í 2 ár aftaná at tað er farið frá sum álitisfólk.
Rættindini í hesum stykki eru eisini galdandi fyri nevndarlimir og varðaálitisfólk.
**Stk. 11.** Tann, sum verður vald/ur til forkvinnu/formann í felagnum hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur stovnurin skyldu at hava starv til viðkomandi, tá ið formanstíðin er úti.

**Avtala um tiltøk, ið kunna stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á kommunalum arbeiðsplássum**

**1. Inngangur**
Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleikar fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandi millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

1 Førleikamenning
2 Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á kommunalum arbeiðsplássum
3 Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á kommunalum arbeiðsplássum
4 Javnstøða

Harafturat eiga rættindi hjá starvsfólkum at verða vird, verður virksemi hjá kommununum lagt til onnur at reka.

**2. Førleikamenning**
Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá á kommunalum arbeiðsplássum. Tað er tað arbeiði, sum tey í kommunalu tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at kommunal arbeiðspláss mennast.
Partarnir eru tí samdir um, at:
1 Miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum kommunalum arbeiðsplássum við høgum tænastustigi.
2 Hvør stovnur sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvør stovnur/hvørt arbeiðspláss at seta sær miðvís menningarmál.
3 Endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna almenna tænastuførleikan.
4 Starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá stovninum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.
5 Sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk á kommunalu arbeiðsplássunum/stovnunum.

**3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á kommunalum arbeiðsplássum**
Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka stovninum eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.
Tá ið stovnar evna sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:

**Niðursett tíð:**
Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:
a) vera fylt 60 ár
b) hava starvast hjá kommununi seinastu 10 árini
c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett

*Lægri starv*
Stovnur kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá landinum í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.
Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.
Stovnurin kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

*Niðursett tíð orsaka av sparingum*
Gera sparingar, at starvsfólk verða sett niður í tíð, varðveitir starvsfólkið eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin varð ikki sett niður. Treytirnar eru:
a. starvsfólkið hevur fylt 55 ár
b. starvsfólkið hevur starvast hjá kommunum seinastu 10 árini
c. arbeiðstíðin er minst ½ tíð, eftir at hon er niðursett.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á kommunalum arbeiðsplássum**
Tá ið lagt verður tilrættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.
Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka daganar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**
Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

**6. Umleggja alment virksemi**
Um so er, at virksemi hjá arbeiðsgevara verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.

**Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á kommunalum arbeiðsplássum**

**§ 1. Inngangur**
Skulu uppgávur verða røktar á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.
Stk. 2. Partarnir halda tað vera avgerandi, at starvsfólk hjá kommunalum arbeiðsgevarum fáa møguleika at menna sín førleika, bæði í dagliga arbeiðnum og við eftirútbúgving og víðari útbúgving. Fyri at fremja førleikamenningina eiga leiðslur og starvsfólk í felag at hava sum mál at stovna felags læruumhvørvi og at leggja til rættis eina smidliga tilgongd fyri **førleikamenningini**. Partarnir eru samdir um, at strategisk mál fyri menningini skulu verða gjørd fyri øll starvsfólk.

**§ 2. Øki**
Avtalan er galdandi fyri starvsfólk, sum eru fevnd av sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og felag, ið hevur undirskrivað hesa avtalu.
**§ 3. Endamál**
Endamálið við avtaluni er at binda leiðslu og starvsfólk til at leggja stóran dent á førleikamenningina, og báðir partar hava ábyrgd av at tryggja, at førleikaminningin styrkist. Hetta skal nokta tørvin á fakligari menning hjá einstaka stovninum og einstaka starvsfólkinum.

**§ 4. Menningarmál**
Fyri hvørt einstakt starvsfólk verður gjørd ein skipað førleikamenningarætlan, ið skal taka atlit at málunum hjá tí einstaka arbeiðsgevaranum.
**Stk. 2.** Árliga er samrøða millum leiðsluna og starvsfólkið, har ítøkilig menningarmál fyri einstaka starvsfólkið verða fest á blað í semju við starvsfólkið. Í starvsfólkasamrøðuni verður eisini viðgjørt um og hvussu, starvsfólkið hevur nátt málunum, ið sett vórðu í síðstu starvsfólkasamrøðu.
**Stk. 3.** Útbúgving og annað menningarvirksemi fer vanliga fram í arbeiðstíðini. Arbeiðsgevarin rindar, jb. stk. 2, útreiðslur av útbúgving.
**Stk. 4.** Leiðsla og starvsfólk hava felags ábyrgd av, at menningarmálini verða rokkin. Leiðslan tryggjar karmar og treytir fyri førleikamenning, og starvsfólkið arbeiðir fram móti avtalaðu menningarmálunum.
**§ 5. Almennur førleiki**
Dagførdur grundleggjandi skúlakunnleiki kann verða treytin fyri at røkja og menna fakliga førleikan. Bæði einstaki arbeiðsgevarin og einstaka starvsfólkið hava ábyrgd av at virka fyri, at almennur førleiki er partur av førleikamenningini.
**§ 6. Leiklutur hjá leiðslu, starvsfólki og samstarvsnevnd**
Leiðsla og starvsfólk skulu í felag, grundað á strategisku málini hjá arbeiðsplássinum og tørvinum á strategiskari førleikamenning

1 áseta grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkunum á arbeiðsplássinum
2 samráðast um grundreglurnar fyri og tørvin á eftirútbúgving fyri allar starvsfólkabólkar
3 áseta leiðreglur fyri, hvussu starvsfólkasamrøður skulu verða skipaðar

**Stk. 2.** Leiðsla og starvsfólk eftirmeta í felag eina ferð árliga førleikamenningartiltøkini á arbeiðsplássinum.
**Stk. 3.** Uppgávurnar í stk. 1 og 2 røkir samstarvsnevndin, um arbeiðsplássið hevur eina slíka. Biður annar parturin um tað, verður ein menningarnevnd vald undir

samstarvsnevndini.
**§ 7. Fylgibólkur**
Ein fylgibólkur verður settur við umboðum fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og tey feløg, sum hava undirskrivað hesa avtalu.
**§ 8. At seta í gildi og siga upp**
Henda avtala verður sett í gildi tann 23. apríl 2015. Avtalan kann skrivliga verða søgd upp við 3 mánaða ávaring til ein 1. í mánaðinum, tó í fyrsta lagi tann 1.oktober 2015.

Tórshavn 23. apríl 2015

Heilsurøktarafelagið Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Avtala um serstaka fríviku**
**Øki**
**§ 1.** Avtalan er galdandi fyri mánaðarlønt starvsfólk.
Stk. 2. Avtalan er eisini galdandi fyri tímalønt, sum eru í starvi í meiri enn 3 mánaðir.
Hvussu frívikan verður innvunnin og hildin
**§ 2.** Aftur at frítíðini eftir frítíðarlógini, vinnur starvsfólk eina sertaka fríviku um árið. Vunnir verða 0,42 serstakar frídagar við løn fyri hvønn mánað í starvi (5 daga vika). Serstøku frídagarnar verða vunnir samsvarandi setanarbrøkinum.
Stk. 2. Serstaka frívikan verður innvunnin og hildin í frítíðarárinum, á sama hátt sum frítíð eftir frítíðarlógini.
**§ 3.** Setanarmyndugleikin og tann setti avtala, nær í frítíðarárinum serstaka frívikan verður hildin. Hon verður løgd í samráð við starvsfólkið, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Starvsfólkið skal boða frá so tíðliga sum til ber, nær atlanin er at halda frívikuna.
Stk. 2 Frídagarnir kunnu verða hildnir hvør sær, eisini sum hálvir dagar.
**§ 4.** Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu í staðin avtala, áðrenn frítíðarárið byrjar, at serstaka frívikan ella partur av henni verður ikki hildin, men útgoldin, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7. Er semja um tað, kann slík avtala eisini verða gjørd í frítíðarárinum.
**§ 5.** Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu eisini avtala, at serstaka frívikan ella partur av henni, sum er ikki hildin, tá ið frítíðarárið er av, verður flutt at halda í seinri frítíðarári.
Stk. 2. Avtalan skal vera skrivlig og avtalað skal eisini verða, nær fluttu dagarnir skulu verða hildnir.
Stk. 3. Verður avtala ikki gjørd sambært stk. 1, verða serstøku frídagarnir útgoldnir, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7.
**§ 6**. Fer starvsfólk úr starvi, og hevur ikki hildið serligu frívikuna ella part av henni, verður hon útgoldin, jb. §7
**§ 7**. Útgjaldið fyri serstakan frídag er 1% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári. Í útrokningini verður ikki tald við løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella útgoldið frítíðarískoyti.
Gildiskoma og skiftisreglur
**§ 8.** Avtalan hevur gildi frá 1. oktober 2003.
**§ 9.** Starvsfólk, sum er í starvi alt innvinningarárið 2003/2004, tvs. frá 1. apríl 2003 til 31. mars 2004, hevur rætt til 5 serstakar frídagar í frítíðarárinum, sum byrjar 2. mai 2004. Hevur starvsfólkið verið í starvi minni enn alt innvinningarárið, verða serligu

frídagarnir lækkaðir samsvarandi.
**§ 10.** Sáttmálafrídagarnir fella burtur 1. januar 2004.

**Protokollat viðvíkjandi arbeiðsumstøðunum**
Partarnir gera í felag eina endamálsorðing fyri hvussu kanningar, ið skulu meta um, um ov stór arbeiðsbyrða er á ávísum arbeiðsplássum skulu gerast. Hetta verður gjørt við tí fyri eyga, at meta um almennar tænastur og arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólki í almennum starvi.
Partarnir gera eina skipan fyri hvussu slíkar kanningar kunnu gerast.

**Viðmerkingar:** Hugt eigur at vera at í hvønn mun verandi stovnar kunnu vera við til at røkka endamálið við omanfyri nevndu kanningum, og um kanningararbeiðið er í tráð við uppgávur ið verandi stovnar longu gera, ella ætla at gera.

Tórshavn 23. Apríl 2015

Heilsurøktarafelagið Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Protokollat viðv. samstarvsráði**
Á øllum kommunalum stovnum verður sett á stovn eitt samstarvsráð, har umboð fyri leiðslu, álitisfólk og varaálitisfólk sita.
Samstarvsráðið skal hava innlit í øll mál stovninum viðvíkjandi, og verða avgerðir ikki tiknar, fyrrenn samstarvsráðið hevur gjørt sítt viðmæli.
Settur verður fýra manna bólkur við tveimum umboðum valdum av yrkisfeløgunum og tveimum valdum av landsstýrinum at gera uppskot til reglugerð fyri virkið hjá samstarvsráðnum.
Til endaliga reglugerðin fyri virkið hjá samstarvsráðnum er samtykt, verður henda regla galdandi í samband við uppsøgn:
Yrkisfelagið skal hava boð um uppsøgnina við nágreiniligari grundgeving, og verður uppsøgnin ikki givin, fyrr enn yrkisfelagið innan 2 vikur hevur ummælt uppsøgnina

**Normtíð fyri mánaðin = 40 tímars vika : 7 x dagatal í mánað x 1,4**

| | | |
|---|---|---|
| Dømi: | mei mánaður hevur 31 dagar | 40 : 7 x 31 x 1,4 = 248,00 |
| Dømi: | juni mánaður hevur 30 dagar | 40 : 7 x 30 x 1,4 = 240,00 |
| Dømi: | februar mánaður hevur 28 dagar | 40 : 7 x 28 x 1,4 = 224,00 |
| Dømi: | februar (skotár) hevur 29 dagar | 40 : 7 x 29 x 1,4 = 232.00 |

Normtíðin fyri mánaðin er alt eftir á hvørjum lønarbýti (brøki) ein er settur á. Um t.d. setanarbýti er 0,70000 - so verður tann fulla normtíðin fyri mánaðin faldað við lønarbýtinum - og útfrá hesum finnur ein normtíðina fyri t.d. lønarbýti 0,70000 (t.d. fyri mei - full normtíð 248,00 kr, verður faldað við lønarbýtinum 0,70000) = 173,60 Hettar merkir ikki at ein skal arbeiða 173.600 tímar í mei-mánaða, men tann arbeidda normaltíðin + mínir vikuligu frídagarnir skulu tilsamans geva 173,600 tímar. Positivt frávik í hesum verður annars góðskrivað, sum *ov nógv arbeiddir normaltímar,* meðan negativt frávik verður skuldskrivað, sum *ovlítið arbeiddir normaltímar*.
Hvaðani kemur talið 1,4 frá?
I eini viku arbeiða vit 40 tímar og hava frí 2 dagar. Tá 40 tímar eru deildir út á 5 dagar á 8 tímar, so eru 2 dagar á 8 tímar eftir. Summurin av hesum er íalt = (40 + 16) = 56 tímar
Full normtíð fyri vikuna inckl. 2 frídagar er sostatt = 56 tímar
52 vikur x 56 tímar um vikuna = 2.912 tímar : 1,4 = 2080 um árið í 52 vikur.
Um vit nú býta 56 tímar við 40, verður úrslitið **1,4**. Hettar merkir at hvørjaferð vit arbeiða 1 tíma, so upparbeiða vit 0,4 tímar til okkara frídag. Um vit nú t.d. arbeiða 1 dag á 8 tímar sær úrslitið soleiðis út. 8 tímar x 1,4 = 11,2
T.v.s. at av 11,2 tímum eru 3,2 tímar upparbeiddir til mínar frídagar.
Um vit nú gera hetta allar 5 arbeiðsdagarnar í eini viku, sær úrslitið soleiðis út.

11,2 tímar x 5 dagar = 56,00 tímar
Av hesum arbeiði eg = <u>40,00 - -</u>

Úrslit 16,00 tímar

T.v.s. at vit upparbeiða okkum 3,2 tímar um dagin til okkara vikuligu frídagar.
(5 dagar á 3,2 tímar = 16,00)
Teir arbeiddu normaltímarnir verða **altíð** faldaðir við 1,4. Hettar verður gjørt fyri at finna útav hvussu nógvar tímar upparbeiddir eru, til mínar frídagar (vikuligu).

Dømi, ið best lýsir útrokningina, er februar mánaður við 28 døgum. - Av teimum 28 døgunum eru 4 leygardag + 4 sunnudagar = 8 frídagar á 8 tímar = 64 tímar
T.v.s. at av teimum 28, arbeiði eg 20 dagar á 8 tímar = <u>160 tímar</u>

Normal arbeiddir tímar + upptjent frítíð 224 tímar